## VIÐMERKINGAR

# §266 b

*-Lógin sum økir um fólkaræði*

**Kim Simonsen**



Vit hava §266 b sum onkur setur upp móti trúðarfrælsi (ið bæði er tryggja í 266 b og í Grundlógini). Her hava vit inntil víðari eitt paradoks, sær tað út til. Mín sak vildi tó verið at prógva, at hetta ikki er so, at báðir bólkar: samkynt og kristin, um tey yvirhalda §266 b (varð lógarbroytingin samtykt) fáa eitt betur lív í einum modernaðum samfelag. Ikki, at tey skulu uppgeva teirra trúgv og meiningar um hvønn annan, bert læra at tolerara hvønn annan, ið er eitt stórt stig fyri samfelagið sum nú er.

Fólkaræði byggir eisini á eitt sannleikaástøði, at eingin í prinsippinum hevur endaliga rætt, men at fólk við ymiskum meiningum skulu kunnu læra at liva við hvørjum øðrum. Og fólkaræði er nú einaferð tað minst ringa vit hava.

Danska §266 b sigur: ”Den, der offentligt eller med forsæt til udbredelse i en videre kreds fremsætter udtalelse eller anden meddelelse, ved hvilken en gruppe af personer trues, forhånes eller nedværdiges på grund af sin race, hudfarve, nationale eller etniske oprindelse, tro eller seksuelle orientering, straffes med bøde eller fængsel indtil 2 år.

Stk. 2. Ved straffens udmåling skal det betragtes som en særligt skærpende omstændighed, at forholdet har karakter af propagandavirksomhed.

Her hugsi eg um at stk. 2 er nakað man ikki skal gloyma, tað er hetta perspektivið, ið ikki verður tikið í álvara í Føroyum, ið ikki er við í føroysku lógini.

**Havi lisið, at**

”Kun meddelelser af en vis grovhed er strafbare. Ytringsfriheden sikrer, at det er muligt at sige sin mening om trosretninger, indvandring, seksuelle former m.v. Det skal blot ske uden at true, forhåne eller nedværdige.” Og

”I retspraksis lægges vægt på, om beskyldninger rettes generelt mod gruppen og vedrører forhold, der er stærkt krænkende efter almindelig opfattelse. Det kan f.eks. være beskyldninger om kriminelle forhold, sammenligninger med dyr eller sygdomme. (…) Det er skærpende for straffen, hvis diskriminerende meddelelser bruges i propagandavirksomhed (§ 266 b stk.2). Det vil sige systematiske forsøg på at påvirke meningsdannelsen.”

Tá fólk sum hava akt innan religiøsar bólkar og samkomur veruliga koma fram og senda samkynt til helvitis (tað er tað nøkur sum siga), so haldi, at hetta burdi skapt presedens fyri at taka hetta í álvara ”Det er skærpende for straffen, hvis diskriminerende meddelelser bruges i propagandavirksomhed (§ 266 b stk.2).” Somuleiðis skulu samkynt virða kristin og ikki kalla tey fyri talibanar ella nasistar.

At ein ella annar sigur hetta her og der, er ikki so umráðandi haldi eg.

Upp móti (pseudo)paradoksinum millum tulkingar av §266 b og trúðarfrælsi fyri kristin, skuldu vit sett ta etisku grundreglu (ið er sekuler), at vert er at verja tann ella tey við favoritisering, ið ikki minka um tolsemi (í mun til onkran sum ger hatta). Her haldi eg, at §266 b er ein undurfundig lóg, tí hon gevur eina heimild til at allir bólkar og minnilutar eisini skulu halda seg til §266 b. Soleiðis koma hesir bólkar at halda hvørjum øðrum skakk. Hetta skal skiljast sum, at um samkynt (ella onkur teirra viðhaldsfólk) gerðst ein bólkur, ið vil forfylgja trúgvandi, so skulu tey kunna dømast eftir §266 b sum øll onnur. Somuleiðis má reglan í §266 b kunna brúkast móti trúgvandi, um tey í teirra trúgv, um tey koma við ákærum sum eru: ” stærkt krænkende efter almindelig opfattelse. Det kan f.eks. være beskyldninger om kriminelle forhold, sammenligninger med dyr eller sygdomme.”

Serliga haldi eg sum sakt, at hetta er serliga álvarsamt, um hetta er gjørt í ”propagandavirksomhed (§ 266 b stk.2). Det vil sige systematiske forsøg på at påvirke meningsdannelsen.”

Sum eg síggi hetta kann §266 b soleiðis halda báðar ekstremar skakk - og hvat er so ringt við tí? Er tað ikki soleiðis vit eru noydd at byggja eitt modernað fólkaræði? Tað er ikki loyvi at kalla negarar fyri óvitandi djór, kristin fyri barnamordarar ella samkynt fyri hvat sum helst. Hetta hevur einki við danska løgfrøði ella danska mentan at gera, sjálvt um okkara samfelag byggir á Donsku Grundlógina og danskar lógir í høvuðsheitum.

Mær vitandi eru bæði rasistar og anti-rasistar (sum diskriminera) undirløgd sama krav. Tað er ikki í ordan at krenka tey sum krenka, við krenkandi meiningum. So eru vit aftur í eyga fyri eyga moralinum. §266 b, og serliga at loyva at javnseta ”tro eller seksuelle orientering”, er vegurin fram frá hesum gamla og primitiva morali.

§266 b minkar ikki um talufrælsið, men staðfestir hin vegin, at skulu vita hava eitt moderna virðiligt samskifti, so er mark fyri hvat vit kunnu siga, soleiðis er hendan lógin ein hin mest modernað sum er til og ein lóg sum økir um fólkaræði og veruliga verjir talufrælsið.

# Svar til hjá Miriam Hinz, Hoyvík

**Elsa Olsen**

*Argir*

Tá eg las greinina hjá greinina hjá Miriam Hinz, Ferðslulógin, kom eg í tankar um nakrar reglur eg skrivaði ein morgun í desember 2002, tá eg varð næstan niðurkoyrd á gongubreytini av prutli. Hendan greinin varð send Tórshavnar Býráð og Sosialinum. Síðan hendan greinin varð skrivað, hava vit fingið eitt gøtuljós í Sandagerði, eg tað eri eg Býráðnum sera takksom fyri.

**”Eitt hjartasuff**

Illa fyri eftir skelkin mær var fyri í morgun, er eingin ivi fyri mær, at hetta má festast á blað. Eg eri ein av teimum heilt fáu til gongu til arbeiðis hvønn morgun - av Argjum til Havnar. Ein gongutúrur, sum tekur umleið ein hálvan tíma. Ein góð byrjan til dagin, og man verður so væl upplagdur restina av degnum. Plagi vanliga at ganga gjøgnum Sandagerð fyri at sleppa undan tí ringastu ferðsluni, har er altíð so vakurt, og síðan fram við Skipasmiðjuni og heim í býin.

Teir seinastu morgnarnar hevur verið sera myrkt í Sandagerði. Har eru eingi gøtuljós, og eg hevði tí avgjørt ikki at fara oman aftur í Sandagerð fyrr enn tað byrjar at lýsa aftur um morgnarnar. Nógv ferðsla er, og bilarnir strúka fram við tær, við hvørt eru teir sera nær, og tú fært okkurt sprutt á teg. Eg havi hesar morgnarnar als ikki kent meg trygga á gongubreytini, men eftir upplivingina í morgun havi eg avgjørt, at eg hóast myrkrið ætli mær oman gjøgnum Sandagerð í morgin.

Sum eg gangi í mínum egnu tonkum á gongubreytini eftir J. Dahlsgøtu, hoyri eg róp og motorgang beint aftan fyri meg. Eg trúði mín síðsta løta var komin. Síggi eitt sterkt ljós og leyp til síðis. Tað var eitt av hesum sokallaðu prutlunum, sum var við at koyra meg niður á gongubreytini. Teir koyrdu allan vegin niðan eftir gongubreytini og snaraðu síðan niðan á Velbastaðvegin, og vóru við at missa tamarhaldið á prutlinum, sum teir flentu. Teir høvdu óivað eina stuttliga sjón. Eg stóð eina góða løtu og summaði meg eftir hendingina. Eg var týðiliga skelkað.

P.S. Til Tórshavnar Býráð: Ber tað til at fáa eitt ella tvey gøtuljós oman í Sandagerð, meðan tað ringasta myrkri er?”

# Eingin djóralæknavakt!?

**Vegna Huff**

*Vár Lamhauge*

**Opið bræv til landsstýrismannin, Bjarna Djuurholm frá Hundaeigarafelag Føroya.**

Heldur skelkaði hoyrdu vit tíðindini og ynskja hervið at sýna okkara ónøgd.

Skal tað veruliga koma fyri, at nú eingir pengar eru eftir í ár, at so kunnu løstaði djór ikki fáa djóralæknahjálp í vikuskiftinum og uttan fyri vanliga djóralæknaarbeiðstíðir? Skal tað nú bert verða hjálp at heinta hjá fólki, ið telja seg hava ráð til at flyta djóralæknan til síni sjúku djór – um ein í heila tikið, er so heppin at fáa samband við ein djóralækna.

Í Føroyum eru lógir ímóti djórapínslu. Men eru tær settar úr gildi uttan fyri arbeiðstíð? Hvat skulu djóraeigarar gera, um djór teirra eru so óheppin at gerast sjúk ella koma til skaða í vikuskiftinum ella um náttina? Og hvør torir at taka ábyrgdina um ólukkan hendir?

Ikki at leita sær djóralæknahjálp alt fyri eitt, um hundurin hevur t.d brotið beini, má sigast at vera djórapínsla. Nú fólk eru forðaði fyri at koma í samband við djóralækna uttan fyri arbeiðstíðir, hvør hevur í núverandi støðu ábyrgdina av, at djórið líður?

Í hesum framkomna samfelagið, har vit løggeva um trivna hjá djórum, mugu vit hava møguleika fyri at koma til djóralækna, tá ið tørvur er fyri tí.

Tað er als ikki nøktandi at víðka telefonskipanina nakrir tímar í vikuskiftinum.

Uttan at leggja ábyrgdina á nakran einstakan, mugu vit krevja at hetta óskil kemur í rætt lag aftur, sum skjótast. Somuleiðis má forðast fyri, at Føroya fólk verða sett í slíka støðu aftur. Hundaeigarafelag Føroya tekur frástøðu frá verandi støðu.

# Katólsk læra í føroysku fólkakirkjuni

**Ebbedinna Jacobsen**

*Kollafirði*

Í útvarpinum varð fyri nakað síðani spurt, hvør hevði funnið upp á at kasta jørð á kistuna, tá ið onkur fer til gravar. Tá kom ein prestur og segði, at tað høvdu vit fingið frá katolikkunum, sum so mangt annað!

Ja, læran um endurføðing í barnadópi, um konfirmatión, altargongd og jørðákasting. Tann dópin hevur pávaveldið skipað fyri.

Tá hugsaði eg, at hetta skal ikki verða óátalað. Læran, sum lutherska kirkjan lærir í Føroyum í dag, er katólsk.

Gud býður fólki Sínum fara út frá skøkjuni, fyri ikki at luttaka í syndum hennara, tí syndir hennara røkka líka til himmals, og Gud hevur dømt hana.

Hugsa um allar bíbliurnar og blóðvitnini, katólska kirkjan hevur brent, sum Krystalnáttin er eitt álvarsamt dømi um.

Tað er tann katólska kirkjulæran, sum er skøkjan í kapitlunum 17 og 18 í Opinberingini:

»Farið út frá henni, fólk mítt, so tit hava ikki lut í syndum hennara og verða rakt av plágum hennara« (18,4).

Kirkjufólkið í Føroyum heldur tað standa væl til, men Gud sigur nakað annað. Feilurin er tann, at tað verður ov lítið lisið í Guds orði. Bíblian liggur ikki frammi at lesa. Ápostulin Paulus sigur í 2. Kor. 6, 14-18:

»Farið ikki undir ójavnt ok saman við vantrúgvandi! Hvønn felagsskap hevur rættvísi við lógloysi, og hvat samfelag hevur ljós við myrkur! Hvat samljóð er millum Kristus og Belial, og hvønn lut hevur trúgvandi við vantrúgvandi! Hvussu kann tempul Guds sameinast við avgudar! – Vit eru jú tempul hins livandi Guds – sum Gud hevur sagt: »Eg skal búgva hjá teimum og ganga millum teirra; Eg skal vera Gud teirra, og tey skulu vera fólk Mítt.« »Farið tí út frá teimum og skiljið tykkum frá teimum – sigur Harrin – og nemið einki óreint! Tá skal Eg taka ímóti tykkum«; „og Eg skal vera tykkum Faðir, og tit skulu vera Mær synir og døtur – sigur Harrin hin Alvaldi.«